Heðin Mortensen

løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um heimleys, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Heldur landsstýrismaðurin, at hjálpin, ið heimleysar familjur og einstaklingar fáa at finna sær bústað, er nøktandi?
2. Er nøkur ítøkilig ætlan um at byggja fjølbroyttar bústaðir beinanvegin?
3. Um ikki, hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera við tað?

Viðmerkingar:
Í einum ríkum vælferðarsamfelag sum okkara, er tað undranarvert, at tað eru familjur og einstaklingar, sum ikki hava atgongd til ein hóskandi bústað, sum tey megna at gjalda fyri – eisini ungar barnafamiljur, støk, lesandi, førleikaskerd, og tey sum stríðast við sosialar og fíggjarligar avbjóðingar.

Hetta er støðan í Føroyum í dag. Sum skilst, ræður landið einans yvir tveimum bústøðum, sum tó bert eru til stakar uppihaldarar, og í mesta lagi í eitt ár. Tí missa vit fólk av landinum. Ungar familjur og fólk við evnum og hegni at taka lut í samfelagnum, fólk sum tørva stuðul at finna seg til rættis, og fólk sum tørva umsorgan og hjálp frá vælferðarsamfelagnum, sum vit saman varða av. Øll vilja tey allarhelst búgva í Føroyum, her familja og vinir frammanundan eru, og her tey hava sítt upphav, trívast og kenna seg heima.

Onnur royna enn at stríðast fyri at verða verandi her, men noyðast at brúka mestsum alla sína orku til at stríðast fyri at fáa ella varðveita bústað, og fáa tí ikki givið tey virðismiklu íkøstini til samfelagið, sum tey annars kundu.

At skapa borgarum møguleika at seta búgv er ein av fremstu uppgávunum, politiski myndugleikin hevur, tí uttan fólkið her býr eru vit lítið ella einki ment. Uttan búsetingarmøguleikar er einki framtíðar samfelag, men fyri undirritaða at síggja hevur landsstýrið mestsum kastað frá sær.

Á Løgtingi, 4. januar 2021

Heðin Mortensen